tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Stórar avbjóðingar fyri framman

Oddagrein

UM góðar tríggjar viku letur 1. útbjóðing til oljuleiting á føroyska landgrunninum aftur. Aðrenn klokkan 12 á middegi mikudagin 17. mai skulu oljufeløg, sum ætla sær at vera við í oljuleiting við Føroyar hava latið Oljumálastúyrinum umsókn.

NETTUPP at hetta er fyrstu ferð nakranatíð, at slík útbjóðing fer fram, er so mikið meira áhuavert, spennandi og eisini álvarsligt. Tí umframt tær positivu og góðu vónir vit hava til eina komandi oljuvinnu, so eru eisini vandamál, sum vit her frá byrjan eiga at geva gætur og røða um. Hetta eru spurningur sum víðvikja trygdini og umhvørvinum og annars ta ávirkan, sum ein slík vinna kann hava á alt okkara samfelag sum heild.

HERFYRI skipaði Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag fyri áhugaverdari hoyring, sum nettupp snúði seg um avbjóðingar og eisini vandamál, ið ein komandi oljuvinna hevur við sær. Tíanverri var hoyringin eitt fríggjakvøld og í ringum veðri eisini, so har møttu bert fá fólk. Men harfyri nýtast vit ikki at gevast við at umrøða hesar spurningar. Tvørturímóti eiga fjølmiðlarnir m. a. við grundarlag í slíkari hoyring at viðgera málið víðari. Eftir okkara tykki hevur ikki minst útvarpið sera góðar umstøður til tess. Tí hesin loftmiðilin er eftir okkara tykki sum gjørdur til at viðgera samfelagsspurningar sum tjak og orðaskifti. Tá verður ikki sagt, at ikki bæði bløðini og sjónvarpið eisini eiga og kunnu viðgera slíkt, men tá tað kemur til debat og tjak um samfelagsspurjningar passar útvarpið sum fótur í hosu til endamálið. Tí skal tað vera ynski okkara og ein áheitan á nettupp útvarpið um at geva hesum stóra máli størri ans í framtíðini - og tá hugsa vit ikki júst um tíðindaflutningin men meira um tað, sum dialogur og samrøður og tjak kunnu geva.

TÁ 17. mai er farin aftur um bak vita vit, hvat aljtóða oljufeløgini av álvara hugsa um Føroyar og møguleikarnar at finna olju her. Vit vita tá, hvussu nógvar pengar hesi feløg eru sinnað til at brúka uppá leiting her, og vit vita eisini í hvussu stóran mun tey vilja taka føroyska samfelagið við í henda útvikling.

BP AMOCO, sum lat skrivstovu upp í Havn herfyri, er so bert eitt av feløgunum, sum ætlar sær at vera við í leitingini. Vónandi fara tað at vera nógv feløg, sum eru við tá avtornar, og vónandi verður tað eisini so, at tey feløg, sum ikki ætla sær av vera við í hesi fyrstu útbjóðing - út frá vónandi góðum leitingarúrslitum - umhugsa seg til at vera við í 2. útbjóðing, nær hon so enn verður. Vit skulu ynskja Oljumálastýrinum og øllum teimum fólkum, sum trúliga hava arbeitt við at fáa hesa 1. útbjóðing í gongd, góða eydnu við víðari arbeiðinum. Og vit skulu eisini ynskja oljufeløgunum, sum vilja vera til til at leita og menna eina oljuvinnu saman við føroyingum, góða eydnu.

Sosialurin

Viðmerking:

Nú sigra sakligar prógvgrundir

Eg eri sera samdur við teimum, sum halda, at ríkisfelagsskapurin er annað og meira enn ein veiting, sum via donsku fíggjarlógina verður latin føroyska samfelagnum sum ískoyti til okkara búskap.

Men vit kunnu heldur ikki latast sum um henda veitingin – blokkurin – ikki er ein partur av okkara búskapi og sum vit bara kunnu taka burtur og so halda, at alt er sum fyrr. Tað ber ikki til.

Um vit vilja tað ella ikki so er búskapur grundarlag undir okkara vælferðarsamfelag. Vit kunnu tosa um nógvar aðrar støddir, sum ganga inn í sjálvt hugtakið vælferð, men eg hugsi, at tá ið vit skulu gera hetta upp ella máta tað, so er tað altíð við eini búskaparligari alin.

At búskapur eisini er grundleggjandi fyri onnur, síggja vit út av eini kanning, sum júst er gjørd í Danmark, um hvat ið er mest avgerandi fyri teirra støðutakan til eitt gjaldoyrasamarbeiði. Ovast á listanum yvir grundgevingar fyri støðutakan er búskapur.

Tað hevur ongantíð verið Tjóðveldisflokkinum fyri at tosa um búskap. Teir hava mestsum avsannað at hetta hugtakið er til og hava tískil heldur ongan politik havt á økinum. Har sum teir ráða verður húsast eftir tilvild uttan atlit til grundleggjandi samanhangir í samfelagnum.

Tá ið so aðrir flokkar í byrjanini av fullveldistosinum settu fullveldisprofetunum spurningar um búskap og búskaparligar avleiðingar, so høvdu hesir sjálvandi einki svar. Teir vóru ikki vanir at verða trýstir við spurningum um t.d. vælferðina, sum kravdu eitt sakligt svar. Í byrjanini royndi Høgni Hoydal at sannføra føroyingar um, at fullveldi fekk ein dynamikk inn í vinnulívi, sum gjørdi at hetta kundi halda vælferðarsamfelagnum á sama støði. Hetta er ein ásannan av, at peningur (blokkur?) skal til, men Høgni Hoydal hevur ikki megnað at sannført føroyingar um tann logiska samanhangin millum fullveldi og dynamikk í vinnulívinum og tískil hevur hann helst eisini sjálvur mist trúnna, síðani einki hoyrdist aftur um hetta hugtaki.

Nú eitur tað ræðumyndir, tá ið onkur roynir at greiða onkrar búskaparligar samanhangir fyri honum. Og tað er fyri mær eitt satt tekin um, at nú eru tær skilagóðu frágreiðingarnar frá tí politisku andstøðuni um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark farnar at bera ávøkst. Tjóðveldisflokkurin varð tikin á bóli í búskaparliga orðaskiftinum, sum tók seg upp saman við fullveldistosinum og hann hevur tí ongantíð fótað sær í viðgerðini av teimum búskaparligu avleiðingunum, sum ein loysing hevur við sær.

Og hetta eru føroyingar farnir at leggja til merkis. Nú er ikki longur nokk við innantómum tosi. Tann felags búskaparliga argumentatiónin sum ein fortreyt fyri meira sjálvstýri og sum Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin støðugt hava fært fram í seinastuni, hevur verið so sannførandi, at veljararnir eru samdir. Ein ásannan av at hava nógv felags sjónarmið og at hava sama hugburð til nógv mál hevur fært hesar báðar flokkar nærri saman go givið teirra orðum so stóra styrki, at veljararnir, um val var í dag, høvdu givið hesum báðum flokkum eins-amøllum ein meiriluta á Føroya Løgtingi. Hetta er eitt heraklapp av teimum stóru.

Og henda undirtøka verður bert at vaksa so leingi formaðurin í Tjóðveldisflokkinum ikki er førur fyri at geva Útvarpi Føroya aðra frágreiðing enn, at hetta er úrslit av eini búskaparligari ræðumynd frá politisku andstøðuni á Føroya Løgtingi. Nei, Høgni Hoydal, hetta kemur av greiðari talu um nøkur grundleggjandi viðurskiftir í okkara tilveru.

Tað hevur ikki borið samgonguni til at skjalprógva nakað sum helst av tí loysn, teir ætla fyri okkara land á ríkisrættarliga økinum. Tað hevur ikki eydnast teimum at sannføra Føroya fólk um, at loysing er nøkur gongd leið. Bert uml. 25% taka undir við tí, sum samgongan hevur sett sær fyri, um hetta skal hava nakrar avleiðingar fyri okkara vælferð. Og tað fær tað.

Henda undirtøkan er so lítil, at tað er viðkomandi at seta spurnartekin við, um samgongan í tí heila tikið kann loyva sær at arbeiða víðari eftir hesi leiðini. Landið skal framvegis umsitast, men tað tykist sum tað mesta av okkara umsiting er upptikin av at arbeiða fyri eini loysn, sum bert uml. 25% av øllum føroyingum taka undir við. Nógvar skattakrónur verða nýttar til fullveldisskútuna, so bert lítið verður eftir til tænastur fyri hini 75%, sum ikki halda at vit skulu taka loysing nú.

Í orðaskiftinum um fullveldi tykist vit og skil at hava vunnið á uppblástum nationalromantiskum postolatum uttan hald í nøkrum veruleika og tað gevur lyftir um skilagóðar loysnir – eisini á tí ríkisrættarliga økinum.

Gøtu 18.04.2000
Atli Hansen

Agurktíðir

Formaður Sambandsfloksins mælir til, at landsstýrið leggur frá sær. Javnaðarflokkurin er ikki so avgjørdur — mælir **bert** til at fullveldiskósin verður broytt. Algoysti mikrofonhaldarin hjá útvarpinum spyr, um ikki hetta, at Sambandið og Javnaðurin nú hava 17 av 32 løgtingslimum, fær avleiðingar. Nýggj samgonga. Og leiðari Javnaðarfloksins hálvgum játtar — jú, hetta gevur okkum okkurt at hugsa um.

Jamen... hvat er hent? Havi eg sum ein annar Rip van Winkle sovið eitt løgtingsval burtur? Og ikki gjørt mína skyldu? Ikki verið á valið....

Men so byrjar at klárna so frætt sum nú einaferð ber til. Hetta snýr seg um eina tilvildarliga veljarakanning.... við teimum vansum, ósikkurheitum og annars áhugaverdu avdúkingum, ein slík kann geva.

Okkara fólkavaldu spæla við. Og 4. statsmaktin — í allari sínari meiningsdannandi veldigheit — skipar kórinum, so vit næstan halda, at HETTA er rættuligt demokrati.

Veruleikin er, at vit nú eru um at fara frá meira traditionellu vesturlendsku demokratifatanini, til nakað annað. Vit kunnu fyri at gera tað nemmari, kalla tað ***postdemokratiið*** (hevur einki við Berg í Garði at gera). Skjótt verður als ikki neyðugt at halda val 4. hvørt ár. Veljarakanningarnar ordna paragraffirnar fyri okkum. Og tað, sum tær ikki klára, kunnu ymsu pressiónsbólkarnir í samfelagnum taka sær av. Smb. uppskot um fjølmiðlanevndirnar — okkara fólkavaldu verða koyrdir .....ella koyra seg sjálvar/sjálv... út á eitt síðuspor. Teir sterkastu pressiónsbólkarnir fara í framtíðini at stýra sokallaðu 4. statsmaktini — teirri almennu í hvussu so er- og lítið er at ivast í, at tilvildarligar meiningskanningar verða tulkaðar eins hysteriskt og hendan seinasta.

Tað eru nú øldir síðani, at Bakhunin kastaði sína seinastu bumbu. Og Marcuse og hansara romantiska radikalisma fangaðu ongantíð ordiliga. Men sannleikin er tann, at vit hava ongantíð verið nærri anarkinum enn vit eru nú.

Eitt samfelag stýrt av veljarakanningum! Og pressiónsbólkum! Og har kann eingin yvirliva uttan ráksnúvningarnir!

"Hvad er livet, et pust i sivet....." segði Dunnaldur Dunna.

Jens Chr. Carlsson
Tórshavn

Einki Yngd í blaðnum í dag

Vegna páskafrítíðina er einki Yngd í blaðnum í dag, men tað verður afturí blaðnum sum vant næsta mikudag

Sosialurin

Ger skjótt av í Keypmannahavn -tak fundarflogfarið

Vanliga fer ein heilur dagur við ferðing, tá farið verður til Keypmannahavnar í snarørindum. Nú vinnur tú dagin innaftur, um tú tekur fundarflogfarið.

Fert tú hósdag, kanst tú arbeiða líka út á seinnapartin og vera í Keypmannahavn um kvøldið. Fert tú sunnudag, kanst tú njóta vikuskiftið í friði og náðum og sita við fundarborðið í Keypmannahavn tíðliga mánamorgun.

Við fundarflogfarinum kanst tú vera aftur í Føroyum 16 1/2 tíma eftir at tú fórt avstað!

Hósdag kl. 17.30
-og koma aftur friggjadag kl. 7.45 ella 15.15

Sunnudag kl. 17.30
-og koma aftur mánadag kl. 7.45 ella 15.15

SARSIR - TEL 355 355

Atlantic Airways
Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur, Tel 333 900, Fax 333 990, e-mail: booking@atlanticairways.fo